## Skifta um arbeiði

Í Danmark er trot á verkfrøðingum, og ein nýggj framrokning vísir, at í 2020 fara 14.000 verkfrøðingastørv at standa tóm í Danmark, verður einki munagott gjørt. Í einari roynd at gera arbeiðið meiri áhugavert og spennandi royna danir nú eina skipan, har verkfrøðingar í almennum starvi og verkfrøðingar í privatu vinnuni kunnu skifta um arbeiði eina tíð. Tað er umráðandi, at partarnir kenna umstøðurnar hjá hvør øðrum, siga fyrireikararnir.



*Í Danmark eru als ov fáir verkfrøðingar*
*(Mynd: Karstensens Skibsværft)*

## Tríggir fólkafloksmenn í Norðstreymoy

Norðstreymoyar Fólkafloksfelag hevði í fjár annan og triðja uppstillingarfund til komandi fólkatingsval. Tríggir mans og eingin kvinna verða listanum úr Norðstreymoy. Teir tríggir eru Bárður Poulsen, skipari úr Vestmanna, Ólavur Hansen, glarmeistari úr Kollafirði, og Heðin Zacahariasen av Streymnesi, sum er landsstýrismaður. Áður hjevur Ingi Olsen eisini verið eitt av sterku kortunum hjá Fólkaflokkinum í Norðstreymoy, men hann hevur júst skift arbeiði, og hevur tí borið seg undan stilla upp.

# din í høvuðsstaðnum



*Avloysarin hjá Jákupi Sólstein, Viberg Sørensen úr Trongisvági. Nú skal hann lyfta arvin eftir formannin seinastu mongu árini og fyrsta uppgávan, sum eru samráðingar millum reiðarar og fiskimenn, verður neyvan hin lættasta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

at soleiðis, sum formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, hevur úttalað seg, sær tað eitt sindur dapurt út í løtuni.

- Samrøðan í Sosialinum í gjár er merkt av bombastiskum úttalilsum, sigur Viberg, sum leggur dent á, at Føroya Reiðarafelag fer ikki at reka samráðingarnar millum partarnar um bløð og aðrar tíðindamiðlar.

Viberg Sørensen og Jónsvein Knudsen, formaður og næstformaður í felagnum, hava sitið í nevndini í nøkulunda sama áramál.

Nú verða tað so í fyrsta lagi teir báðir, sum koma at mynda felagið úteftir.

Spurdur, hvørja tíð hann hevur til at átaka sær formansuppgávuna, sigur Viberg, at tíðin er eingin trupulleiki.

- Eg havi fingið góða tíð til hetta. Tað er sonurin Ragnar, sum førir Anitu í skifti við Leiv Ryggshamar í Vági. Tað eru nøkur ár, síðan eg var umborð á Anitu seinast. So leingi, sum tað gongur hjá teimum yngru, og teir hava hug at reka virksemið, er tað í fínasta lagi. Tá er eingin grund til at blanda seg.

Anita er garnabátur, og Viberg heldur, at tað hevur gingið hampiligt.

- Skipið fiskar havtasku og svartkalva. Fiskiskapurin eftir svartkalva hevur verið lakur seinastu árini, men í heyst hevur borið frægari til aftur, sigur hann.

### Alt kann henda

Á fundinum millum nevndirnar í Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, sum verður klokkan 14.30 í dag, fara partarnir at tosa víðari um møguleikarnar fyri semju.

Viberg væntar kortini ikki, at semingsmenninir fara at snikka nakað semingsuppskot til í dag, tí til tess eru samráðingarnar komnar ov stutt.

- Royndirnar vísa, at tá ið tú ert til samráðingar, kann alt henda. Tað ber illa til at siga nakað frammanundan. Vit siga ikki, sum formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, at fáa vit einki burtur úr, so er eingin "góða mamma" – so verður verkfall! Vit tosa slett ikki um verkfall, meðan vit samráðast. Tað er ein spurningur, sum verður tikin upp, um partarnir ikki kunnu semjast, og veruleikin liggur á borðinum.

Viberg leggur dent á, at Føroya Reiðarafelag byrjar ikki nakrar samráðingar við at tosa um verkfall. Tað heldur hann ikki tænir nøkrum endamáli, og samráðingarnar eru ikki slitnaðar, so leingi partarnir tosa saman.

- Tað hevur ongantíð verið siðvenja millum partarnar at tosa um verkfall, næstan áðrenn tú sessast við samráðingarborðið, leggur hann aftrat.

### Eingin viðmerking

Vit spurdu nývalda formannin í Føroya Reiðarafelag, hvat hann heldur, tað fer at merkja frameftir, at Føroya Fiskimannafelag hevur fingið nýggjan formann.

- Nei, tað kann eg einki siga um í løtuni, tí enn er hann so nýggjur. Eg kenni hann ikki til at kunna gera mær nakrar metingar um tað.

Viberg vísir á, at ígjøgnum mong ár sat Føroya Fiskimannafelag hinumegin borðið við Óla Jacobsen sum formanni.

- Tað var mangan ógvuliga tungt at vinna undir land, men Óli var ein dugnaligur og ógvuliga skilagóður formaður. Hann var ein maður, sum hevði fingurin á pulsinum og kendi øll viðurskifti í hesum partinum av vinnuni út í æsir. Tað var hansara sterka síða.

Nývaldi formaðurin í Føroya Reiðarafelag heldur tí, at tíðin má vísa, hvussu nýggi maðurin á Bryggjubakka fer at roynast.

- Vit vóna í hvussu er, at feløgini fáa eitt fruktargott samstarv.

### Upp og niður

Viberg leggur dent á, at tað altíð gongur – og fer at ganga - upp og niður hjá ymisku pørtunum í fiskiskipaflotanum.

- Nøkur ár eru ávísir skipabólkar uppi á alduryggi, onnur ár eru teir í aldudali. Hetta hava vit so nógv dømir um. Tann, sum ikki veit og hevur upplivað tað, hevur fylgt ov illa við. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað altíð at verða.

Hann vísir, at í fleiri ár hevði rækjuskipaflotin tað gott, meðan pelagiski flotin hevði vánalig ár. Nú er vent. Flestu rækjuskip eru farin av knóranum, meðan pelagiski flotin hevur havt nøkur góð ár.

- Í løtuni vita allir menn, at fiskiskapurin er minkaður – ikki minst eftir toski, og ringast fyri í hesum eru línuskipini, sum í fleiri førum eisini hava ilt við at fáa manning. Hjá lemmatrolarunum gongur heldur einki serligt.

Viberg sigur, at meðan øktu fiskaprísirnir hava verið við til at hildið veiðivirðinum uppi, gongur nú sjón fyri søgn.

- Í seinastuni hava vit sæð, at veiðivirðið eisini minkar, og tá gevur hetta trupulleikar at reka skipini á forsvarligan hátt við teimum methøgu oljuprísunum, vit hava í løtuni.

### "Eg hopi tað.."

At enda spurdu vit nývalda formannin í Føroya Reiðarafelag, um hann væntar, at partarnir í sáttmálatrætuni fara at finna eina loysn, so sleppast kann undan møguligum verkfalli í fiskiskipaflotanum?

- Tað dugi eg slett ikki at siga í løtuni. Eg vænti, at tað verður trupult, men eg hopi, at feløgini koma ásamt um nýggjan sáttmála í sátt og semju, tá ið avtornar, sigur Viberg Sørensen, nývaldur formaður í Føroya Reiðarafelag.